Runavíkar Kommuna

# Leiðari til Frítíðarskúla og dagstovn í Rituvík

Eftir summarfrítíðina flytir Frítíðartilboði til 1. flokk í skúlan í Rituvík. Umframt frítíðartilboðið, verður eisini veitt heildagstilboð til 6 ára gomul børn, har skúlabúning verður ein tíðandi partur av tilboðnum. Á stovninum verða uml 35 børn úr 1. flokki og 35 børn í forskúlaldri. Normeringin á stovninum verður tann sama sum fyri barnagarðsbørn í barnaansingini.

Við hesum tilboðnum ynskir Runavíkar kommuna at halda fast við og styrkja menningina hjá børnum í forskúlaaldri, saman við frítíðartilboðnum til 1. flokk, soleiðis at skifti frá barnaansing til barnaskúla verður enn betri og smidligari.

**Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum. Harumframt hevur hann ábyrgd av:**
- at stovnurin er í støðugari menning,
- at starvsfólk trívast og mennast,
- at tað støðugt verður arbeitt við at menna námsfrøðiliga tilboðið eftir tørvinum hjá tí einstaka barninum og út frá teimum fortreytum sum stovnurin virkar undir.
- At samstarva við kommunalu umsitingina, við aðrar leiðarar innan barnaansingina og við aðrar viðkomandi stovnar

**Vit leita eftir leiðara, ið er**
- útbúgvin námsfrøðingur
- er førur fyri at skera ígjøgnum og taka avgerðir
- er nýhugsandi og ígongdsetandi
- hevur góð samstarvsevni
- evnar at eggja og menna starvsfólkið
- hevur góð evni at orða seg munnliga og skrivliga
- hevur telduførleika á brúkarastøði

**Vit bjóða tær**
- avbjóðingina at standa fyri at sameina royndirnar hjá frítíðarskúlanum við menning av einum pedagogiskum tilboð til børn í forskúlaaldri
- »LEKODA« skeið í leiðslumenning saman við øðrum leiðarum í kommunalu barnaansingini

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast gjørligt eftir nærri avtalu. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya Leiðarastarvið verður lønt á stig 23-29. Leiðarin vísir beinleiðis til sosialdeildarleiðaran í kommununi.

**Fleiri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Jákup H. Foldbo sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

**Søk starvið**
Við at senda Runavíkar kommunu eina umsókn í seinasta lagi 18.06 2008

**Runavíkar Kommuna**
**Sosiala deild**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139 · FO-600 Saltangará

---

Runavíkar Kommuna

## Hevur tú áhugða í at arbeiða við børnum í 6-7 ára aldri

# Pedagogar og hjálparfólk til Frítíðarskúla og dagstovn í Rituvík

Eftir summarfrítíðina flytir Frítíðartilboði til 1. flokk í skúlan í Rituvík. Umframt frítíðartilboðið, verður eisini veitt heildagstilboð til 6 ára gomul børn, har skúlabúning verður ein tíðandi partur av tilboðnum. Á stovninum verða uml 35 í 1. flokki og 35 í forskúlaldri. Normeringin á stovninum verður tann sama sum fyri barnagarðsbørn í barnaansingini.

Við hesum tilboðnum ynskir Runavíkar kommuna at halda fast við og styrkja menningina hjá børnum í forskúlaaldri, saman við frítíðartilboðnum til 1. flokk, soleiðis at skifti frá barnaansing til barnaskúla verður enn betri og smidligari.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Er útbúgvin pedagogur ella hevur aðra viðkomandi útbúgving
- Hevur áhuga og royndir í at arbeiða við børnum
- hevur góð samstarvsevni
- dugir væl at samskifta
- ert íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- ert nýhugsandi og ígongdsetandi
- evnar at orða teg munnliga og skrivliga
- sær møguleikar framum forðingar

**Vit bjóða:**
- Eitt starv við møguleika at menna eitt nýtt pedagogiskt tilboð frá grundini.
- Eitt spennandi umhvørvi tætt við haga og á.

**Setanarviðurskifti**
Søkt verður eftir fýra pedagogum á 30-40 t. um vikuna, einum hjálparfólki uml. 30 t um vikuna, eitt køksstarvsfólk uml.20 t um vikuna. Størvini verða sett at byrja 1. august ella eftir nærri avtalu. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Pedagogar verða løntir á stig 11-18 og hjálparfólk á stig1-7. Um vit ikki fáa pedagogar í øll pedagogstørvini kunnu hjálparfólk verða sett í tíðaravmarkað starv.

**Fleiri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Anju Hentze, leiðara á tlf. 216630 ella
Jákup H. Foldbo sosialdeildarleiðara á tlf. 417000.

**Søk starvið**
Við at senda Runavíkar kommunu eina umsókn í seinasta lagi 18.06.08

**Runavíkar Kommuna**
**Sosiala deild**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139 · FO-600 Saltangará

---

Runavíkar Kommuna

# Lærarastørv og starv sum stuðul í Skála skúla

**Hesi 4 størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2008:**

**Hesi 4 størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2008:**
- **1 fast fulltíðarstarv frá 1. august 2008.**
- **1 tíðaravmarkað starv, fulla tíð og 1 tíðaravmarkað starv, uml. 20 tímar um vikuna** vegna avlopstímar, lækkað tímatal, serligan tørv . Endaliga tímatalið verður ásett eftir 1. sept.
- **1 starv sum stuðulsfólk 14 tímar um vikuna** til næming við serligum tørvi.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarv við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- eru við til áhaldandi at menna skúlan

**Harafturat skulu lærararnir hava førleika at átaka sær:**
- undirvísa gentum og dreingjum í ítrótti og svimjing.
- undirvísa í donskum, enskum og náttúru/tøkni
- undirvísa í handverk og list: tónleiki, evning, træsmíð, heimkunnleika, handarbeiði, teldu.
- flokslærari.
- serundirvísing
- annars átaka sær undirvísing í øðrum lærugreinum

**Førleikakrøv**
Lærarautbúgving og helst linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Lønar- og setanartreytir**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttanso,attann,iðsetturverður,ertænastumannasettur lærari frammanundan.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2

Starvið sum stuðul verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsøknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera fyrstalæraranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 20. juni kl. 16.00.

Meira kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum Hans Jákup Andreasen á tlf. 442118 ella 586005.

**Skála skúli** er ein 5. flokkaður skúli við undirvísing í 1.-7. árgang. Komandi skúlaár verða 10 lærarar og 74 næmingar.

SKÁLA SKÚLI

Skálavegur 194 · FO-480 Skála
Tlf. 441368 · Fax 441360
skalask@post.olivant.fo
www.skulin.fo/ska

---

Sp/f Plan

Søkt verður eftir royndum maskinførara.
Koyrikort krevst.
Byrjað skjótast gjørligt

TLF. 21 49 37

Sosialurin